Guðrun nýtur hvørja løtu

Guðrun Sólja Jacobsen hevur verið jagstrað av fjølmiðlunum seinastu dagarnar, eftir at fyrsta fløga hennara kom á gøtuna

TÓNLEIKUR
Stefan í Skorini

Ein stórhending í føroyskari tónleikasøgu. Soleiðis kann nýggjasta útgávan hjá einum føroyskum tónleikanavni lýsast.

Talan er um útgávuna hjá tvøroyrargentuni Guðruni Sólju Jacobsen, nevnd Quiet Storm, ið kom á gøtuna mánadagin.

– Eg eri sera væl nøgd við fløguna, nú hon er liðug framleidd. Hetta er mín fyrsta útgáva, og tí er tað sjálvandi nakað heilt serligt, sigur Guðrun Sólja. Hon lýsir fløguna sum ein blanding millum pop og rock.

Guðrun dylur ikki fyri, at hon er sera væl nøgd við lívið beint nú. Hon hevur sera nógv um at vera, men tað nervar hana ikki stórvegis. Hon livir eitt spennandi lív við nógvum avbjóðingum hvønn dag.

Lættur tónleikur
Hetta er lættur tónleikur, sum fellur væl í oyrað. Tó eru løgini sera ymisk og fjølbroytt. Alt frá balladum til James-Bond-tónleik, sum Guðrun sjálv tekur til. Glaður tónleikur, sum vísir nógvar ymsar kenslur og hugløg.

Tað er stóra plátufelagið Universal, sum gevur fløguna hjá Guðrun út, og tað var ein av vinningunum í Stjerne for en aften, sum danska sjónvarpsrásin DR skipaði fyri.

Guðrun vann finaluna í Forum, sum eisini varð varpað út til meira enn eina millión hyggjarar í Danmark.

Ein nógv umbiðin genta
Upptøkurnar til fløguna vóru lidnar fyri einum mánaði síðan, men Guðrun hevur tó havt sera nógv um at vera hesa tíðina.

Hon hevur staðið ógvuliga nógv á palli í summar, tí at fleiri konsertir hava verið á skránni. Eisini hava fjølmiðlar verið sera grammir eftir at fáa orðið á Guðruna.

– Nú fløgan kom út havi eg verið sera nógv upptikin við at tosa við fjølmiðlar, sigur hon. Eg havi annars ikki tosað so nógv við fjølmiðlar seinastu tíðina, síðan eg vann kappingina.

Mánadagin, sama dag sum fløgan kom út, sat Guðrun í Tivoli í Keypmannahavn frá á middegi til náttúrðatíð og tosaði við nøkur av teimum donsku bløðunum.

Teirra millum vóru Billed Bladet, Ekstrablaðið, Ude og Hjemme og Se & Hør. Harumframt hevur B.T. gjørt eina stóra grein um Guðrun fyri nøkrum døgum síðani. Ikki kann sigast annað enn at hon er ein nógv umbiðin genta í hesum døgum, og flestu danir munnu nú kenna snýðið hjá Guðrun,

Størri møguleikar í Danmark
Eingin ivi er um, at møguleikarnir fyri at gera sei galdandi innan tónleikaheimin eru størri í Danmark enn í Føroyum. Hetta ásannar Guðrun, men enn hevur hon ikki tikið støðu til, um hon fer at fáa sær fasta bústað í Danmark.

– Møguleikarnir fyri at koma víðari eru nógv størri her niðri enn heima í Føroyum, men enn havi eg so fasta adressu í Føroyum, sigur Guðrun, sum hevur verið nógv í Danmark seinastu tíðana.

Konsertirnar hava verið nógvar í tali, síðan Guðrun vann Stjerne for en aften, men tað var eisini ein av vinningunum í kappingini.

Hon hevur verið á bæði Langelands og Skanderborgs Festivalinum, og fyri framman standa nakrar slotskonsertir, sum vera komandi vikuskiftið. Tá skal hon vera við á tveimum útikonsertum, sum vera á Ledreborg slot leygardagin og sunnudagin.

Harumframt hevur hon verið við á fleiri Se & Hør konsertum, sum hava verið í summar. Tær eru tólv í tali, men nú eru bara tríggjar konsertir eftir. Friggjakvøldið er Se & Hør konsert í Nysted, har Guðrun eisini skal á pallin. Hesar konsertirnar hava fleiri kend donsk nøvn á plakatini so sum Peter Belli, Keld og Hilda Heick, Søs Fenger og Cargo.

Missir ikki fótafestið
Hóast Guðrun nú dagliga ferðast í tónleikaumhvørvinum, har hon møtir nógvum kendum fólki, og alt fongur við rúkandi ferð, so missir hon ikki fótafestið.

– Tað liggur ikki til mín at missa fótafestið, sigur Guðrun avgjørd. Eg eri fallin væl til í hesum umhvørvinum, og eg trívist væl í Danmark. Tað ræður um at slappa av og njóta tað, sigur Guðrun.

– Eg havi fólk kring meg, sum hava bæði beinini á jørðini, og tí fari eg heldur ikki á flog.

Tað hevur av sonnum verið ein stór kollvelting í lívi hennara. Um hugsað verður hálvt ár aftur í tíðina, var hon ein ókend genta av Tvøroyri, sum gekk í 3. s í studentaskúlanum í Vági.

– Eg hevði als ikki hetta í huganum, tá eg meldaði meg til kappingina. Eg havi altíð viljað sungið, og tað sleppi eg nú, sigur Guðrun Sólja.

Góðar tónasmiðir
Tað eru teir tríggir Joakim Pederser, ið var kapellmeistari í Stjerne for en aften, Chief 1, sum var dómari í somu kapping og Jesper Winge Leisner, sum er ein royndur tónasmiður, ið hava gjørt løgini og tekstirnar til fløguna. Guðrun hevur sjálv verið við til at gera tvey av løgunum á fløguni.

– Hendan fløgan er skrivað til mín, slær Guðrun fast, og hon fegnast stórliga um úrslitið.

Um eina viku koma tey fyrstu sølutølini inn á borðið hjá hennara manager, og tá verður spennandi siggja, hvussu fløgan selur.



– Tað liggur ikki til mín at missa fótafestið, sigur Guðrun avgjørd. Eg eri fallin væl til í hesum umhvørvinum , og eg trívist væl í Danmark. Tað ræður um at slappa av og njóta tað, sigur Guðrun

Familjan hjá Guðrun hevur óivað fingið nøkur eintøk av fløguni Quiet Storm, sum nú er á gøtuni. Á Tvøroyri munnu tey eisini fegnast um útgávuna

Sundaberg fiskar gulllaks

Verksmiðjutrolarin Sundaberg hjá JFK Troli í Klaksvík fiskar í løtuni gulllaks undir Føroyum. Veiðan verður avreidd í Miðvági

FISKIVEIÐA
Edvard Joensen

Miðvági: Sundaberg avreiðir gulllaks til Føroya Fiskavirking í Miðvági. Skipið hevur gjørt tveir túrar higartil og lagt góð 300 tons upp í Miðvági.

Jákup Sólstein hjá JFK Troli sigur, at felagið eigur eina gulllaksakvotu upp á 4.000 tons undir Føroyum, og gjørt er av, at Sundaberg skal fiska hana í ár.

Tað, sum eftir er í Barentshavinum, væntar hann, at Skálaberg klárar at fiska, tó at tað ikki er endaliga gjørt av enn, um Sundaberg kanska eisini skal fara ein túr eystureftir, tá gullaksatíðin er av.

Jákup Solstein sigur, at prísurin fyri gulllaksin er einki soleiðis at tosa um. Einar tríggjar krónur fyri kilog, sigur hann. Eini 15 mans eru við Sundabergi.

Albert Ellefsen, virkisleiðari hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, sigur, at vanliga plagar gulllaksatíðin at strekkja seg september mánað út. Men hvussu verður í ár, er kanska eitt sindur torført at siga, tí fiskamarknaðurin í Europa er vánaligur yvirhøvur. Tað er tungt at selja fisk í løtuni, sigur hann.

Umframt Sundaberg landar eisini Vesturbúgvin gulllaks til Fiskavirking í Miðvági. Vesturbúgvin landaði 120 tons mánadagin, og Sundaberg var í gjar við umleið 180 tonsum, sigur Albert Elelfsen.

Tað tekur eimum einar fimm dagar at arbeiða hesar nøgdirnar undan, og so koma bátarnir innaftur, tá líðugt er at arbeiða undan. Túrarnir verða lagdir eftir, hvussu virkið er komið undan, sigur hann. Allur gulllaksurin verður malin til fars.

Umframt gulllaks arbeiða tey eisini upsa í Miðvági. Hann fáa tey í stóran mun frá Vesturtúgvu. Men eisini vestmannatrolararnir Grønanes, Fram og Vestmenningur eru av og á á Miðvági, greiðir Albert Ellefsen frá.

Tað er nógv arbeiði á ársins arbeiðsplássi í løtuni. Tá mest er, eru eini størthundrað fólk til arbeiðis. Men vanliga liggur talið um 100 fólk, sigur virkisleiðarin. Arbeitt verður í tveimum vaktum, á10 tímar, sigur hann.

Umframt Sundaberg og Vesturbúgvan fiska eisini Eysturbúgvin, Vesturleiki og Vestursøki gullaks undir Føroyum. Teir landa til Tavuna í Leirvík.

Sundaberg landaði gullaks í Miðvági týsdagin. Hetta var annar túrur hjá teimum í summar

Mynd: Edvard Joensen

Fyrr fingin undir Føroyum

Makrelgeddan, sum tveir sandavágsdreingir fangaðu sunnudagin, er fyrr fingin undir Føroyum, veit Fiskirannsóknarstovan at siga frá

SJÁLDSAMUR FISKUR
Edvard Joensen

Fiskurin, sum teir báðir Sandavágsdreingirnir, vit nevndu í blaðnum í gjár, fangaðu á Miðvági, er fingin undir Føroyum nakrar feðrir áður, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

Hann sigur, at talan er um fisk, sum ikki er vanligur undir Føroyum, tí hann livir í heitari sjógvi. Men eitt nú Jákup Sverri Joensen, fiskifrøðingur, hevur nevnt hann millum fiskar fingnir undir Føroyum. Hann er fingin bæði á Skálafirði og eisini á bankunum kring Føroyar, vísir Jákup Sverri Joensen á.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at fiskurin helst er komin hendanveg við heitari sjógvi, sum ríkin er hendanveg. Sjógvurin kring Føroyar er heitari í ár, enn hann er vanlig ár, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Hvørjar avleiðingar tað hevur, ella um tað hevur avleiðingar yvirhøvur, vilja tey á Fiskirannsóknarstovuni ikki siga nakað um enn. Fylgt verður við, hvussu gongdin er, sigur Hjalti í Jákupsstovu og vísir á, at Magnus Heinason í løtuni er úti og ger yvirlitstrolingarnar, sum gjørdar verða á hvørjum sumri.



Makrelgeddan er ikki púra ókend undir Føroyum. Hon er fingin her nakrar ferðir áður, veit stjórin á Fiskirannsóknarstovuni at siga frá.

Mynd: Edvard Joensen

Atlantsflog á samanstoytskós

Flogfarið hjá Atlantsflogi og eitt lítið amerikanskt flogfar stevndu móti hvørjum øðrum í somu hædd vestur úr Íslandi. Føroyska flogfarið fekk boð um at lække, og eingin vandi var nakrantíð á ferð, siga íslendskir loftferðslumyndugleikar

FLOGFERÐSLA
Edvard Joensen

Tað var ongantíð nakar veruligur vandi á ferð, tá eitt flogfari hjá Atlantic Airways og eitt lítið amerikanskt flogfar stevndu hvørt móti øðrum í somu hædd. Ein flogleiðari á Reykjavíkar flogvølli gav føroyska flogfarinum boð um at lækka, og tá flogførini møttust ,var frástøðan um 1.000 føtur, sigur Thormóður Thormóðsson, formaður í kanningarnevndini hjá íslendsku loftferðslumyndugleikunum.

Heimir Már Pétursson í Flugmálastjórn Íslands, sigur við Sosialin, at talan var um eina hending, sum fór fram vestur úr Íslandi seinnapartin tann 1. august.

Flogfarið hjá Atlantsflogi var á veg til Grønlands, og var eftir øllum at døma farið hægri upp, en tað hevði fingið boð um, sigur Heimir Már Pétursson.

Um somu tíð kom eitt lítið amerikanskt flogfar eystureftir, og bæði flogførini flugu í somu hædd. Hetta varnaðist ein flogleiðari á flogvøllinum í Reykjavík, og hann av beinanveg flogfarinum boð hjá Atlantsflogi boð um at flúgva 1.000 føtur lægri. Tað varð eisini gjørt, og tað var ongantíð nakar dramatikkur yvirhøvur, sigur Heimir Már Petursson.

– Hetta er støða, sum vit javnan uppliva, og hóast einki álvarsligt er á vási, verður boðað frá til kanningarnevndina, sigur hann.

Thormóður Thormóðsson, formaður í Rannsóknarnefnd flugslysa, greiðir frá, at nevndin hevur fingið málið til kanningar, og at kanningar í løtuni verða gjørdar.

– Tað, sum hendi, sigur hann, var at seinnapartin 1. august klokkan 16.10 kom fráboðan um, at tvey flogfør flugu í somu hædd einar 145 fjórðingar vestur úr Íslandi. Hæddin var 23.000 føtur, greiðir hann frá. Annað flogfarið var tað hjá Atlantsflog, og hitt var eitt lítið amerikanskt flogfar við tveimum monnum umborð.

Flogfarið hjá Atlansflogi fekk boð um at lække 1.000 føtur, og tá flogførini møttust, var mett, at hetta var fráleikin, sigur Thormóður Thormóðsson.

Hann sigur, eins og Heimir Már Pétursson, at dramatikkur var eingin yvirhøvur.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi sigur við Sosialin, at hann veit um hendingina, men at ongin formlig fráboðan er komin frá íslendsku loftferðslumyndugleikunum til Atlantsflog.

Hann sigur, at umborð á flogfarinum hjá Atlantsflogi virkaðu ávaringarskipaninar, sum tær skuldu, og tey vistu eisini av hinum flogfarinum. Sama var við trygdarskipanini í Reykjavík, sum gav boðini um at lækka flogfarið.

– Slíkt kemur fyri av og á, og vit kunnu so bara staðfesta og gleðast um, at trygdarskipanirnar eru í lagi hjá okkum, sigur Magni Arge,

Flogfarið hjá Atlantsflog og eitt lítið amerikanskt flogfar flugu móti hvørjum øðrum í somu hædd. Eingin veruligur vandi var kortini nakrantíð fyri samanstoyti